# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Nei, eg fari ikki frá nú, tí nú ræður um at tryggja viðurskiftini og at skipa eina demokratiska stjórn*
*(Pervez Musharaf)*

# Vunnið 10 sigrar á rað

**Barrack Obama hevur aftur vunnið tvey uppstillingarval. Hesaferð í Wisconsin og á Hawaii-oyggjunum**




Í nátt vann Barrack Obama uppstillingarvalið hjá demokratunum í statinum Wisconsin, og fyrrapartin frættist, at hann hevði eisini vunnið á Hawaii-oyggjunum. Hesin seinasti var hansara 10. sigur á rað.

Sostatt er lagt upp til ein sera spennandi dyst í næsta mánað, tá uppstillingarval verða í Texas og Ohio. Barrack Obama hevur nú fleiri valmenn enn Hillary Clinton, og fyri hana er tað tí sera umráðandi at vinna í Texas og Ohio.

Hjá republikanarunum vann John McCain sannførandi í Wisconsin. Tað tykist nú heilt vist, at hann verður forsetavalevni hjá republikanarunum í heyst, og hann hvesti eisini orðalagið í morgun.

-Eg fari at stríðast hvønn dag fyri at forða fyri, at amerikanararnir ikki lata seg tøla av einari innantómari eggjan til broyting, segði McCain í takkarrøðu síni í morgun og sipaði til Barrack Obama.

# 5 ára gamla Lea doyði í hungri og tosta

**Foreldrini eru ákærd fyri tilætlað morð og kunnu fáa lívlanga fongsulsrevsing**

Í novembur í fjør fekk ein lækni í týska býnum Schwerin boð um at koma at hyggja at eini smágentu. Hann gjørdi alt fyri eitt av at koyra gentuna á sjúkrahús, men hóast læknarnir har royndu, var einki at gera. Gentan doyði.

Tann 5 ára gamla Lea-Sophie skuldi av røttum viga umleið 40 pund, men tá hon kom á sjúkrahúsið, vigaði hon bara 15 pund. Lea-Sophie doyði heilt einfalt í hungri og tosta.

Kanningar hjá løgregluni avdúkaðu, at foreldrini høvdu misrøkt gentuna í fleiri mánaðir, og nú eru tey ákærd fyri tilætlað morð og kunnu fáa lívlanga fongsulsrevsing. Tey hava greitt løgregluni frá, at tey hildu ikki, at gentan var so sjúk, sum hon var. Tey eiga eisini ein tveir mánaðir gamlan son, og honum hava myndugleikarnir tikið sær av.

Málið um Lea-Sophie hevur skakað Týskland, og kanslarin, Angela Merkel, sigur, at hon er skelkað av, at tílíkt yvirhøvur kann henda í einum vælferðarsamfelagi sum tí týska.




*Fólk heilsaðu Lea-Sophie við ljósum, blómum og bamsum, tá deyðsboðini av henni bórust*
*(Mynd: AFP)*



*Turkisku hermenninir við irakska markið bíða eftir, at kavin fer at minka í fjøllunum. So er klárt at leypa á*
*(Mynd: AP)*

# Turkar til reiðar at fara inn í Irak

**Fleiri tíggjutúsund turkiskir hermenn standa við irakska markið og bíða eftir betri veðurlíkindum til at fara yvirum**

Í fleiri mánaðir hevur turkiski herurin savnað herfólk og útgerð fram við irakska markinum, og nú er herurin til reiðar at fara um markið, tá hann fær boð um tað. Hinumegin markið hava kurdiskir uppreistrarmenn støð, og tað er teimum, turkiski herurin skal eftir.

- Ætlanin um at gera innrás í Irak liggur á borðinum í Ankara, men tað er umráðandi, at veðurlíkindini eru til vildar, segði turkiski uttanríkisráðharrin, Ali Babacan, við CNN í gjár. Hann vildi ikki siga, nær innrásin verður, men váttaði, at fyrst í mars er eitt gott boð, tí tá er kavin minkaður í fjøllunum við markið.

Amerikanararnir hava ávarað Turkaland ímóti at fara ov harðliga fram í Norðurirak, men turkiski forsætisráðharrin, Tayyip Erdogan, hevur sagt, at herurin fer at gera tað, sum er neyðugt fyri at vinna bardagan á kurdisku uppreistrarmonnunum.

## STUTT SAGT

### Skotin niður í morgin

Amerikanski herflotin hevur fingið boð um at royna at skjóta ein vilstan fylgisvein niður í morgin. Amerikanararnir hava ikki tamarhald á fylgisveininum, sum hevur flogið uttan mið og mál runt um Jørðina í meiri enn eitt ár. Nú er hann á veg aftur ímóti Jørðini, og tí ætla amerikanararnir at skjóta hann niður fyri at tryggja, at hann ikki skal detta niður í bygt øki. Fylgisveinurin er til støddar sum ein bussur og vigar fleiri tons. Ætlanin er, at eitt herskip skal skjóta eina rakett eftir honum, tá hann kemur inn í atmosferuna. Tað verður ætlandi í morgin.

### Kolera tekur lív

Tær seinastu vikurnar hava stór øki í Mosambik staðið undir í vatni, og avleiðingarnar av tí eru millum annað, at nógv fólk líða av kolera og øðrum sjúkum. Myndugleikarnir siga, at minst 72 fólk eru deyð av kolera og øðrum sjúkum. Sagt verður, at av teimum 72 doyðu 64 í bygdini Tete. Sjálv vatnflóðin hevur kravt umleið tíggju mannalív, og í onkrum føri hava krokodillur tikið fólk, sum eru komin ov nær einum áarbakka ella vatni, skrivar AP. Umleið 100.000 fólk eru flýdd undan vatnflóðini, og umleið 250.000 fólk hava brúk fyri mati og øðrum frá tí almenna og hjálparfelagsskapum.

### Stórur froskur

Vísindamenn hava funnið leivdirnar av einum risastórum froski, sum sambært teimum somu vísindamonnunum hevur livað á Madagaskar fyri umleið 70 milliónum árum síðani. Teir hava eisini roknað út, at ein froskur av hesum slagnum hevur vigað umleið átta pund. Hann hevur havt smáar føtur, men sera stóran kjaft. Vísindamenninir siga, at fundið á Madagaskar bendir á, at eina ferð í tíðini var tað landfast ímillum Madagaskar, India og Suðuramerika.